**AVTALA sambært § 2. í sáttmálanum**

**millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya**

**§ 1.**

Hendan avtala er gjørd sambart galdandi sáttmála millum MFS og KLF frá 1. oktober 2006. Víst verður til § 2. og § 50. stk. 4., tó uttan nr. 1001 og nr. 1002. í § 72.

Landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálum hevur nú tikið endaliga avgerð um at seta eina nýggja vaktarskipan fyri kommunulæknaskipanina í verk, frá 16. apríl 2007 at rokna.
Verandi vaktarøkir Norðuroyggjar, Eysturoy, Vágoy, Norður Streymoy og Suður Streymoy, verða løgd saman í eitt vaktarøki við einum vaktcentrali á Landssjúkrahúsinum í Tórshavn.

**§ 2.**

Tríggir læknar manna nýggju vaktarskipanina, ein vaktlækni og tveir koyrilæknar. Vaktlæknin er á vakt á vaktcentralinum. Annar koyrilæknin røkir vestara part av vaktarøkinum, sum er Suðurstreymoyarlæknadømi (við útoyggjum), Vága Læknadømi (við útoyggjum) og øll Norðurstreymoy. Hin koyrilæknin røkir eystara part av vaktarøkinum, sum er øll Eysturoyggin og Norðuroyggjar.

Koyrilæknarnir er til taks somu tíðir som forvaktin til miðnátt. Síðan er bert annar koyrilæknin á vakt og røkir samlaða vaktarøkið millum kl. 24 til 08.

Vaktlæknin og koyrilæknin hava vakt somu tíðir uttan frá kl. 24 til kl. 08 tá bert ein koyrilækni er á vakt.

Gerandisdagar er vakt frá kl. 16 til 24.
Hálvar frídagar er vakt frá kl. 12 til 24.
Í vikuskiftinum og halgidagar er vakt frá kl. 08 til kl. 24.
Einans vaktlæknin og ein koyrilækni eru á vakt frá kl. 24 til kl. 08.
Vaktlæknin skal verða á vaktcentralinum.

**§ 3.**

Vaktargjald verður goldið fyri hesar tíðir:
Læknin á vaktcentralinum á náttarvakt kl. 24 til 08: Samsýning 320,00 kr. fyri tíman.
Koyrilæknin gerandisdagar frá kl. 16 til 24: Samsýning 125,00 kr. fyri tíman.
Koyrilæknin vikuskiftir og halgidagar frá kl. 08 til 24: Samsýning 125,00 kr. fyri tíman.
Koyrilæknin hálvir frídagar frá kl. 12 til 24: Samsýning 125,00 kr. fyri tíman.
Koyrilæknin frá kl. 24 til 08: Samsýning kr. 160,00 fyri tíman.

Gjøldini í § 72 eru galdandi, tó verða nr. 1001 og nr. 1002 í § 72 ikki tikin við. Somuleiðis er avtalað, at vaktargjøldini eftir §2 avtalum ikki verða prístals javnaði, men skulu avtalast millum partarnar. Broytingin av gjøldunum skal avtalast millum partarnar, tó í fyrsta lagi 1. januar 2009.

**§ 4.**

Ein vaktarleiðari skal setast til at skipa fyri vaktunum, og til at hava eftirlit við, at vaktarskipanin er mannað við skikkaðum læknum. Ætlandi skal vaktleiðarin vera vaktfríur, men tó altíð vera tøkur, hann fær fasta løn frá MSF kr. 2.500 fyri mánaðin. KLF lýsur og setur starvið.

**§ 5.**

Ferðaútreislur til og frá vaktcentralinum vera goldnar sambart verandi sáttmála § 76 við 2.50 kr. fyri hvønn koyrdan kilometur. Afturat kemur endurgjald fyri tunnilsgjald, roknað sum lægsta kubbagjald.
Avroknast skal á tí fyrstu rokningini á vaktini, ið verður rokna sum nr. 0471 í § 72.
Omanfyristandandi er bert galdandi fyri teir læknar sum hava meira enn 20 km. til vaktcentralin.

**§ 6.**

Avtalan kemur í gildi 16. apríl 2007. Samstundis fer avtalan frá 1. desember 2006 úr gildi.

Tórshavn tann 5. oktober 2007

| **Fyri MSF** | **Fyri KLF** |
| --- | --- |
| Tórbjørn Mikkelsen | Jaspur Petersen |
| Herman J. Dam | Andor Ellefsen |